SEV

Netroknskapur 2018

# Vegurin slóðaður fyri grønum framburði



NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
541 705

**Ársfrágreiðing og ársroknskapur 2018**
Ársaðalfundur 24. apríl 2019
Myndir: Ólavur Frederiksen, Jens Kristian Vang, Finnur Justinussen, Alan Brockie, Høgni í Jákupsstovu, Minesto, Høgni Heinesen, Landsbyggifelagið, Kári Durhuus, Benjamin Rasmussen, Otto West, Pauli Djurholm, Eyðna J.M. Joensen og SEV.

Umbróting, prent og liðuggerð: Føroyaprent

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

# Netroknskapur 2018

# Innihaldsyvirlit


Upplýsingar um felagið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 4
Leiðsluátekning . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 5
Átekning frá óheftum grannskoðara . . . . . . . . . . . . . . . . . 6
Høvuðs- og lyklatøl. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 8
Leiðslufrágreiðing . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9
Nýttur roknskaparháttur. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 17
Rakstrarroknskapur 1. januar – 31. desember . . . . . . . . 21
Fíggjarstøða 31. desember. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 22
Peningastreymsuppgerð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 24
Notur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 25

# Elfelagið SEV
# Netroknskapur fyri 2018

## Innihald


| | |
|---|---|
| Leiðsluátekning | 5 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 6 |
| Høvuðs- og lyklatøl | 8 |
| Leiðslufrágreiðing | 9 |
| Nýttur roknskaparháttur | 17 |
| Rakstrarroknskapur 1. januar – 31. desember | 21 |
| Fíggjarstøða 31. desember | 22 |
| Peningastreymsuppgerð | 24 |
| Notur | 25 |


### Felagið

Elfelagið SEV
Fyrisiting:
Landavegur 92
Postboks 319
FO-110 Tórshavn
Telefon: 346800
Heimasíða: www.sev.fo
Teldupostur: sev@sev.fo
Heimstaður: Vestmanna
Roknskaparár: 01.01-31.12
V-tal: 331538

### Nevnd

John Zachariassen, formaður (COB)
Hans Jákup Johannesen, næstformaður
Marin Katrina Frýdal
Jónsvein Hovgaard
Sune Jacobsen
Vinjard Tungá
Kristian Eli Zachariasen

### Leiðsla

Hákun Djurhuus, stjóri (CEO)
Bogi Bendtsen, deildarstjóri fyri fyrisiting (CFO)
Jón Nielsen, deildarstjóri fyri net (COO)
Heri Mortensen, deildarstjóri fyri framleiðslu (CPO)

### Grannskoðan

P/F Januar
Løggilt grannskoðanarvirki
Óðinshædd 13, Postboks 30, FO-110 Tórshavn
Telefon: 31 47 00 Telefaks: 35 17 01
Teldupostur: januar@januar.fo
Heimasíða: www.januar.fo

## Leiðsluátekning

Nevndin og stjórnin hava í dag lagt fram netroknskapin fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2018 hjá elfelagnum SEV. Netroknskapurin er eisini ein partur av ársfrásøgnini hjá elfelagnum SEV.

Netroknskapurin er gjørdur í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at netroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2018 og av úrslitinum av netvirkseminum hjá felagnum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2018.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, hin 5. apríl 2018

### Stjórn

*Hákun Djurhuus*
*Stjóri*

### Fíggjarleiðsla

*Bogi Bendtsen*
*Deildarstjóri fyri fyrisiting*

### Nevnd

| | | |
|---|---|---|
| *John Zachariassen*<br>*Formaður* | *Hans Jákup Johannesen*<br>*Næstformaður* | *Marin Katrina Frýdal* |
| *Jónsvein Hovgaard* | *Sune Jacobsen* | *Vinjard Tungá* |
| *Kristian Eli Zachariasen* | | |

# Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til leiðsluna í Elfelagnum SEV**

## Niðurstøða

Vit hava grannskoðað netroknskapin, sum inniheldur upphæddir fyri rakstrarroknskap, fíggjarstøðu, peningastreym og notur fyri Elfelagið SEV fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2018. Upphæddirnar í Netroknskapinum eru partur av ársfrásøgnini fyri Elfelagið SEV fyri tíðarskeiðið 1. januar – 31. desember 2018, sum vit hava grannskoðað.

Tað er okkara fatan, at netroknskapurin fyri Elfelagið SEV fyri tíðarskeiðið 1. januar – 31. desember 2018 á øllum týðandi økjum er gjørdur í samsvar við tær roknskaparreglur, sum verða lýstar í nýttum roknskaparhátti.

## Grundarlag fyri niðurstøðuni

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti “Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða netroknskapin”. Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða etisku krøvunum fyri grannskoðarar (etisku reglunum hjá IESBA) og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, eisini hava vit hildið hinar etisku skyldurnar hjá okkum, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

## Áherðsla á viðurskifti í netroknskapinum – nýttur roknskaparháttur

Vit skulu gera vart við upplýsingarnar í innganginum av hesari váttan, harav tað framgongur, at netroknskapurin er gjørdur eftir teimum roknskaparreglum, sum verða lýstar í nýttum roknskaparhátti.

Hesi viðurskifti hava ikki ávirkan á okkara niðurstøðu.

## Ábyrgd leiðslunnar av netroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera netroknskapin samsvarandi teimum roknskaparreglum, sum verða lýstar í nýttum roknskaparhátti. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at netroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

## Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða netroknskapin

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at netroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa við høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum verður gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í netroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðar fyri týðandi skeivleikum í net¬rokn¬skapinum, uttan mun til um skeiv¬leikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burtur¬úr¬legging, vill¬leiðingum ella við at skúgva innan¬hýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á

ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

Tórshavn, hin 5. apríl 2019

P/F JANUAR

løggilt grannskoðanarvirki

| | |
|---|---|
| Hans Laksá | Jógvan Amonsson |
| Statsaut. revisor | Statsaut. revisor |

# Høvuðs- og lyklatøl

| Upphæddir í tkr. | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | | | | | |
| Nettosøla | 429.648 | 434.900 | 421.436 | 417.605 | 411.888 |
| Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar | 102.611 | 90.602 | 90.739 | 125.810 | 70.502 |
| Rakstrarúrslit | 61.696 | 55.684 | 56.661 | 91.454 | 40.671 |
| Fíggjarligir postar, netto | -24.102 | -21.348 | -35.106 | -13.609 | -8.840 |
| **Ársúrslit** | **28.625** | **33.302** | **12.351** | **77.844** | **31.831** |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Fíggjarstøðujavni | 1.601.382 | 1.337.184 | 1.295.072 | 999.388 | 789.369 |
| Eginogn | 451.323 | 449.456 | 449.734 | 432.052 | 352.356 |
| **Lyklatøl** | | | | | |
| Renting av eginogn | 6,3% | 7,4% | 2,7% | 19,8% | 9,5 % |
| Ognarumferð | 0,27 | 0,33 | 0,33 | 0,42 | 0,52 |
| Eginognarpartur | 28,2% | 33,6% | 34,7% | 43,2% | 44,6 % |

*) Lyklatølini eru útroknað í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforenings „Anbefalinger & Nøgletal 2011“.

# Leiðslufrágreiðing

### Høvuðsvirksemið
Elfelagið SEV er eitt interkommunalt lutafelag, ið hevur til endamáls at fáa til vega elmegi og býta hana millum íbúgvarnar í limakommununum. Eftir viðtøkum elfelagsins skal endamálið fremjast sambært vinnuligum meginreglum á búskaparliga tryggum støði og við fyriliti at náttúru og umhvørvi.

Hesin roknskapur fyri netvirksemið hjá SEV er ein partur av samlaða roknskapinum hjá SEV. Frágreiðingin fevnir um netvirksemið, íroknað fyrisiting hjá felagnum í tíðarskeiðinum 1. januar 2018 til 31. desember 2018.

### Gongdin í virkseminum

### Endurnýgging
Arbeiðið at endurnýggja og víðka 10, 20 og 60 KV netið heldur fram. Hetta verður gjørt í tøttum samstarvi við aðrar myndugleikar, kommunur, Landsverk og Føroya Tele.

Felagið hevur í ár bygt fleiri nýggjar 10 og 20 KV trafostøðir runt um í landinum. Eisini eru vit í ferð við at byggja 5 nýggjar 60 kV koplingarstøðir. Innan Eið (við Varmakeldu), á Strond, ein verður bygd á Sundi í sambandi við nýggja verkið á Sundi og ein verður bygd í Vestmanna - hendan støðin kemur í staðin fyri støðina í stendur á Válinum. Eisini hava vit endurnýggjað og víðkað støðina í Trongisvági.

### Viðlíkahald
Aftur í ár er nógv viðlíkahaldsarbeiði farið fram á netinum, alt fyri at tryggja eina støðuga streymveiting til brúkaran

Mynd 1 vísir eitt yvirlit yvir feilir seinastu mongu árini. Myndin vísir, hvussu talið á feilum er fækkað frá 1989 til 2018. Miðvísa viðlíkahaldsarbeiðið saman við endurnýggingini av elnetinum, er orsøkin til, at SEV í dag ikki hevur fleiri feilir á háspenningsnetinum.

Teir 12 feilirnir, ið vóru skrásettir í 2018, eru ikki feilir, sum merkjast hjá øllum brúkarunum samstundis, men merkjast í avmarkaðum økjum av landinum, hetta kann vera ein kaðalfeilur í einum ávísum býlingi ella ein háspenningssikring, ið er farin í eini transformarastøð.

### Feilir á háspenningskervinum í 2018
Í 2018 vóru 12 feilir á háspenningskervinum. Mynd 2 vísir, hvørjir feilir hava verið, og hvar í skipanini teir vóru.

### Gongdin Í fíggjarligu viðurskiftinum

### Inntøkur
Tað eru tríggir tættir, ið ávirka høvuðsinntøkuna hjá SEV. Hesir tríggir tættir eru elprísbroyting, broyting í elnýtsluni og forskjóting ímillum ymiskar kundaprísbólkar.

*Mynd 1: Feilir pr. ár.*



*Mynd 2: Útgreining av feilum 2018*




Inntøkurnar hjá netpartinum stava frá sølu av elmegi til vinnuligar, privatar og almennar kundar herundir kommunur. Harumframt stava inntøkurnar frá føstum gjøldum, íbindingargjøldum og øðrum ómaksgjøldum frá somu kundum og annað.

Felagið hækkaði elprísin 1. januar 2011 við 0,15 kr. pr. kWt við góðkenning frá Elveitingareftirlitinum. Samstundis ásannaði Elveitingareftirlitið tá saman við SEV, at við høga oljuprísinum og við atliti at tørvinum at útbyggja og endurnýggja bæði á linjuøkinum og í framleiðsluni, verður neyðugt við príshækkingum í framtíðini. Tí hækkaði felagið aftur elprísin tann 1. januar 2012 við 0,10 kr. pr. kWt og aftur tann 1. januar 2013 við 0,05 kr. pr. kWt fyri allar vanligar brúkarar og 0,11 kr. kWt. fyri "ídnaðarkundar", sum eru kundar felagsins í serstøku gjaldskránni fyri ídnaðarvirkir, fiskaaling, landbúnað, fiskivinnu og ávísar kt-tænastur við eini árligari nýtslu størri enn 20.000 kWt, nú 30.000 kWt.

Harumframt hækkaði felagið eisini íbindingargjøldini galdandi frá 1. januar 2013 fyri at skapa lønsemi í virkisøkinum innan íbinding. Hesin kostnaður hevði ikki verið javnaður seinastu mongu árini, tí hekk raksturin innan hetta virkisøkið ikki saman. Við hækkingini javnvigar økið.

Prísurin fyri ídnaðarkundarnar var aftur hækkaður við 0,05 kr. í januar í 2014. At hækka prísin fyri einstakar kundar meiri enn aðrar er liður í at fremja eitt betri lønsemi í teimum ymisku kundabólkunum.

Eingin prísbroyting varð framd í 2015 og 2016.

Eykaaðalfundurin tann 25. november 2016 samtykti, eftir uppskotið frá nevndini hjá SEV, at elprísurin skuldi lækka við 0,05 kr. pr. kWt fyri allar kundar felagsins tann 1. januar 2017. Elprísurin lækkaði aftur við 0,05 oyrum 1. januar 2018 fyri allar kundar felagsins uttan kundarnir í serligu prísskránni við einari nýtslu størri enn 30.000 kWt.

Í 2011 fór SEV undir at gera sjálvstøðugar roknskapir fyri framleiðslu- og netpartin. Í hesum sambandi hevur felagið tikið hædd fyri at rokna vinning í framleiðslupartinum á sama hátt, sum kravt er í sambandi við vindorkuútboðini. Innrokningin av vinningi er fyri at geva eina rættvísandi mynd av rakstrinum hjá framleiðslupartinum sæð í mun til avkastkrav og virðisrøkt av ognunum hjá framleiðslupartinum. Tí er fyri fyrstu ferð vinningur roknaður av framleiðslupartinum mótvegis netpartinum í 2011.

Fyri framleiðslupartin merkir hetta, at hesin skal hava allan sín kostnað rindaðan, íroknað kostnaðin fyri netumsitingina og netábyrgdina. Harumframt skal framleiðsluparturin hava eitt yvirskot svarandi til umleið 4-5% av primoeginpeninginum.

Roknaða kravið til vinningin í 2018 er 37,5 mió. kr. móti 34,5 mió. kr. í 2017, svarandi til 5,0% av primoeginpeninginum hjá framleiðslupartinum. 4-5% í vinningi metur SEV er eitt rímiligt avkast í løtuni í mun til inflasjón og aðrar íløgumøguleikar.

Samlaða úrslitið fyri netpartin gjørdist 28,6 mió. kr. í 2018 og 33,3 mió. kr. í 2017, sum er grundað á kravið um eginfígging.

Sambært elveitingarlógini skal netvirksemið fíggjarliga hvíla í sær sjálvum soleiðis, at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda fyri rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur.

Fyri netpartin merkir hetta, at hesin kann hava eina inntøku svarandi til tær útreiðslur netparturin hevur soleiðis, at netparturin kann gjalda fyri raksturin umframt, at netparturin skal hava inntøkur til at kunna rinda fyri ætlaðar neyðugar íløgur. Inntøkurnar fyri neyðugu íløgurnar taka støði í kravinum til eginfígging.

Tá farið verður undir at gera íløgur, er neyðugt at hava eina ávísa eginfígging soleiðis, at ikki øll íløgan skal fíggast við lántøku. SEV hevur mett, at ein eginfígging uppá 25% er nøktandi, og hevur, síðani 2016, tikið hædd fyri hesum kravinum í roknskapinum fyri framleiðslupartin og netpartin.

Kravið til støddina av eginfíggingini tekur støði í íløgunum á fíggjarætlanini fyri framleiðslupartin og netpartin.

Frameftir verður markið ásett til 25% í eginfígging. Markið skal síggjast í mun til íløgurnar á fíggjarætlanini fyri eitt rullandi 5-ára tíðarskeið. Í fíggjarætlanini fyri 2019 sæst, at íløgurnar fyri 2018-2022 í framleiðslupartinum eru 1.420 mió. kr. Hetta svarar til 284 mió. kr. árliga í miðal. Eginfíggingarparturin fyri 2018 er soleiðis ætlaður til 71 mió. kr.

Fyri netpartin er talan um íløgur fyri 797 mió. kr., svarandi til 159 mió árliga og er eginfíggingarparturin samsvarandi ætlaður til 40 mió. kr. Tað er umráðandi, at eginfíggingin er á einum nøktandi støði, og hetta kann bert gerast við avlopi á rakstrinum.

Eginfíggingin fyri inniverandi ár verður roknað soleiðis: peningastreymurin frá rakstur minus kostnað til rentur og avdrátt sett í mun til kravið uppá 25% fyri eginfígging av árligu miðalíløgum næstu 5 árini.

| Talva 1. Kundabólkur í GWt | Landbúnaður, aling, fiskivinna og ráevnisvinna | Gerð, framleiðsla og byggivirksemi | Handils-, matstovu- og gistihúsvirksemi | Flutningur, postur og fjarskifti | Fígging, trygging og aðrar vinnutænastu | Almennar og privatar tænastur kirkjur, samkomur | Gøtuljós | Sethús, íbúðir, summarhús og neyst | Tilsamans avroknað | Árlig broyting í % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2008 | 23,1 | 53,8 | 22,9 | 25,1 | 4,2 | 36,2 | 7,0 | 81,5 | 245,4 | 4,5 |
| 2009 | 25,8 | 52,0 | 22,6 | 24,4 | 4,5 | 35,6 | 6,7 | 80,5 | 253,9 | 3,5 |
| 2010 | 25,9 | 48,9 | 22,5 | 28,7 | 4,2 | 36,5 | 6,8 | 81,3 | 251,9 | -0,8 |
| 2011 | 26,4 | 44,5 | 22,4 | 31,8 | 4,2 | 36,8 | 7,3 | 81,4 | 255,0 | 1,2 |
| 2012 | 29,4 | 52,5 | 21,6 | 34,7 | 3,9 | 36,6 | 6,9 | 75,7 | 254,8 | -0,1 |
| 2013 | 29,2 | 69,3 | 22,7 | 25,1 | 4,0 | 37,7 | 7,4 | 78,9 | 261,4 | 2,6 |
| 2014 | 31,1 | 76,1 | 24,7 | 25,7 | 4,0 | 37,3 | 7,0 | 78,0 | 274,4 | 5,0 |
| 2015 | 36,6 | 76,5 | 23,1 | 24,9 | 3,9 | 37,9 | 7,1 | 78,0 | 283,8 | 3,4 |
| 2016 | 37,9 | 73,9 | 24,4 | 25,6 | 3,9 | 40,5 | 7,0 | 78,1 | 291,4 | 2,7 |
| 2017 | 42,1 | 85,5 | 24,4 | 24,3 | 3,6 | 41,5 | 6,7 | 78,2 | 306,3 | 5,2 |
| **2018** | **56,8** | **82,2** | **24,9** | **24,3** | **3,7** | **42,1** | **6,6** | **79,9** | **320,5** | **4,6** |
| Broyting 2017 - 2018 í GWt | 14,7 | -3,3 | 0,5 | 0,0 | 0,1 | 0,6 | -0,1 | 1,7 | 14,2 | |
| Broyting 2017 - 2018 í prosent | 35,0 | -3,9 | 2,2 | 0,1 | 2,3 | 1,5 | -1,9 | 2,2 | 4,6 | |

Fyri netpartin merkir hetta, at ársúrslitið verður tillagað soleiðis, at yvirskotið er svarandi til tær útreiðslur netparturin hevur umframt eina eginfígging uppá 25% av árligu miðalíløgunum næstu 5 árini fyri netpartin.

Býtið av yvirskotinum millum framleiðslupartin og netpartin árini frammanundan hevur tikið støði í at tilluta framleiðslupartinum eitt úrslit, svarandi til at allur kostnaður er rindaður íroknað kostnað fyri netumsitingina og netábyrgdina, harumframt 4-5% vinning av primoeginpeninginum. Um samlaða úrslitið fyri samtakið var størri, var hesin parturin av úrslitinum fluttur til netpartin. Hetta er nú broytt við, at tað er netparturin sum hevur eitt tillagað úrslit og ikki framleiðsluparturin.

Rakstrarúrslitið fyri netpartin í 2018 var eitt yvirskot upp á 28,6 mió. kr. móti einum yvirskoti í 2017 upp á 33,3 mió. kr. ella ein afturgongd uppá 13,2 mió. kr.

Inntøkur felagsins frá steymgjaldi og fasta gjaldinum í 2018 vóru tilsamans 419,2 mió. kr. mótvegis 409,8 mió. kr. í 2017. Hesar gjørdist sostatt 9,4 mió. kr. hægri í 2018. Felagið avroknaði 320,5 í sølu av GWt til kundar felagsins, svarandi til eina framgongd í søluni uppá 4,6%. Sjálvt um felagið lækkaði prísin fyri ein part av kundum felagsins er talan um eina framgongd í inntøkunum stavandi frá streymgjaldinum.

Hinvegin er talan um eina afturgongd í íbindingargjøldunum uppá 18,2 mió. kr. í mun til 2017, har hesi vóru ávikavíst 9,2 mió. kr. og 27,4 mió. kr. Aðrar inntøkur eru 1,2 mió. kr. í 2018 móti -2,4 mió. kr. í 2017, svarandi til eina framgongd uppá 3,6 mió. kr.

Samlaðu inntøkurnar í 2018 gjørdist soleiðis 429,6 mió. kr. móti 434,9 mió. kr. í 2017 svarandi til eina afturgongd upp á 5,3 mió. kr. ella 1,2%.

Talva 1 vísir avroknaðu elsøluna í GWt til kundar felagsins.

Víst verður annars til fleiri sundurgreiningar í tølunum innan søluna í samtaksroknskapinum hjá felagnum, sum sæst á www.sev.fo.

Í fleiri ár á rað er inntøkan vaksin næstan uttan undantak orsakað vaksandi elnýtslu. Árliga broytingin í elnýtsluni sæst í talvu 1.

Sum talvan fyri avroknaðu elsøluna vísir, so er stór framgongd í elsøluni til "Landbúnaðin, aling, fiskivinnu og ráevnisvinnu". Framgongdin í hesum bólkinum hongur saman við góðu gongdina

| Talva 2. Nýtsla fyri privatbrúkarar / oyggj | kWt pr. oyggj 2018 | kWt pr. oyggj 2017 | kWt pr. oyggj 2016 | Brúkarar 2018 | Brúkarar 2017 | Brúkarar 2016 | Miðal nýtsla fyri hvønn brúkara 2018 | Miðal nýtsla fyri hvønn brúkara 2017 | Miðal nýtsla fyri hvønn brúkara 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Borðoy | 7.996.263 | 7.959.312 | 7.952.990 | 2.136 | 1.970 | 1.967 | 3.744 | 4.040 | 4.043 |
| Eysturoy | 17.696.238 | 17.300.523 | 17.305.600 | 4.507 | 4.214 | 4.182 | 3.926 | 4.105 | 4.138 |
| Fugloy | 36.898 | 44.208 | 36.396 | 13 | 13 | 13 | 2.838 | 3.401 | 2.800 |
| Hestur | 50.459 | 48.943 | 49.926 | 27 | 27 | 27 | 1.869 | 1.813 | 1.849 |
| Kalsoy | 161.664 | 172.852 | 188.169 | 81 | 80 | 80 | 1.996 | 2.161 | 2.352 |
| Koltur | 9.004 | 8.717 | 8.826 | 2 | 2 | 2 | 4.502 | 4.359 | 4.413 |
| Kunoy | 272.700 | 267.653 | 247.867 | 69 | 64 | 64 | 3.952 | 4.182 | 3.873 |
| Mykines | 72.148 | 70.296 | 58.766 | 41 | 41 | 41 | 1.760 | 1.715 | 1.433 |
| Nólsoy | 405.441 | 400.336 | 402.733 | 138 | 133 | 132 | 2.938 | 3.010 | 3.051 |
| Sandoy | 2.115.370 | 2.106.306 | 2.117.425 | 697 | 656 | 657 | 3.035 | 3.211 | 3.223 |
| Skúvoy | 81.220 | 80.402 | 82.773 | 40 | 40 | 40 | 2.031 | 2.010 | 2.069 |
| Streymoy | 36.645.044 | 35.828.288 | 35.702.344 | 9.987 | 9.141 | 9.073 | 3.669 | 3.920 | 3.935 |
| Suðuroy | 7.039.166 | 6.946.503 | 7.139.616 | 2.300 | 2.152 | 2.152 | 3.061 | 3.228 | 3.318 |
| Svínoy | 41.156 | 39.899 | 43.135 | 24 | 22 | 22 | 1.715 | 1.814 | 1.961 |
| Vágoy | 5.578.304 | 5.352.731 | 5.257.579 | 1.404 | 1.320 | 1.313 | 3.973 | 4.055 | 4.004 |
| Viðoy | 902.287 | 915.992 | 913.658 | 224 | 216 | 216 | 4.028 | 4.241 | 4.230 |
| **Tilsamans** | **79.103.362** | **77.542.962** | **77.507.803** | **21.690** | **20.091** | **19.981** | **3.647** | **3.860** | **3.879** |

hjá alivinnuni og pelagisku vinnuni seinastu árini, og stórar útbyggingar hjá hesum kundum viðførir ein øktan tørv eftir elmegi. Hinvegin er talan um afturgongd í elsøluni til "Gerð, framleiðsla og byggivirksemi", har afturgongdin mest sannlíkt skyldast at færri nøgdir av fiski eru virkaðar, serliga innan pelagisku vinnuna.

Eisini er ein afturgongd í søluni av el til gøtuljós. Kommunurnar kring landið hava gjørt nógv við at umleggja gøtuljósini til meiri orkusparandi ljós, og hetta sæst eisini á tørvinum fyri elmegi, har hesin er minkandi. Framgongd er í bólkinum "Handils-matstovu-og gistingarvirksemi, sum samsvarar við økta talið av ferðafólkum. Somuleiðis er sølan til sethús vaksin, sum er í tráð við økta eftirspurningin eftir sethúsum.

Samlað er sølan økt við 4,6% í 2018 mótvegis eini øking í søluni í 2017 uppá 5,2%. Hesi seinastu tvey árini er sostatt talan um ein vøkstur uppá knapliga 10%, svarandi til 29,1 GWt. Um hugt verður eftir søluni í 2018 í mun til ultimo 2013 er henda økt við 59,1 GWt, svarandi til ein árliga miðal vøkstur uppá 4,2%.

Talva 2 vísir nýtsluna fyri privatar brúkarar býtt sundur á oyggjar.

Sambært talvu 2 hava brúkarar í Koltri størstu nýtslu, meðan brúkarar í Streymoy hava eina miðalnýtslu upp á 3.669 kWt. Miðalnýtslan fyri allar oyggjar er 3.647 kWt. Smærri pláss sum Fugloy, Hestur og Mykines hava helst fleiri brúkarar, tí hús standa tóm partar av árinum. Hetta ávirkar miðalnýtsluna fyri hvønn brúkara á hesum plássum.

Víst verður annars til fleiri sundurgreiningar í tølunum innan søluna í samtaksroknskapinum hjá felagnum, sum sæst á www.sev.fo.

## Útreiðslur

Útreiðslurnar í 2018 vóru 392,1 mió. kr., harav 261,3 vóru fyri keyp av elframleiðslu, netábyrgd og netumsiting móti 400,6 mió. kr. í 2017, harav 281,7 mió. kr. vóru fyri keyp av elframleiðslu v.m.

## Kostnaður fyri netábyrgd

Í samlaðu útreiðslunum hjá verkunum er íroknað kostnaðurin fyri framleiðslu av elmegi og kostnaðurin fyri netábyrgd.

Kostnaðurin tilsamans kann sundurgreinast í kostnað fyri stýring av elnetinum, kostnað fyri veitingartrygd, rullandi mátt, tøkan mátt og kostnað fyri netábyrgd annars. Framleiðsluverkini selja sína framleiðslu av elmegi til netvirksemið, sum rindar fyri keypið umframt kostnaðin fyri tí partinum av netábyrgdini, sum verkini standa fyri.

## Kostnaður fyri stýring av elnetinum

Stýringin av elnetinum í Suðuroy fer fram á framleiðsluverkinum í Vági, meðan stýringin av elnetinum í meginøkinum fer fram á Fossáverkinum í Vestmanna.

Kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum á Fossáverkinum upp á 2,3 mió. kr. er uppgjørdur sum samlaður kostnaður fyri lønir á Fossáverkinum eitt vanligt rakstrarár upp á 3,0 mió. kr., frádrigið kostnaðin fyri lønir til vanligan rakstur av verkinum upp á 0,7 mió. kr. Kostnaðurin fyri vanligan rakstur á verkinum er settur til at verða tann sami, sum tað kostar at reka Mýru- og Heygaverkið tilsamans, svarandi til 0,7 mió. kr. eitt vanligt rakstrarár. Sami kostnaður fyri stýringina av elnetinum á Fossáverkinum er brúktur til kostnaðin fyri stýringina av elnetinum í Suðuroy svarandi til 2,3 mió. kr.

## Kostnaður fyri veitingartrygd, rullandi mátt og tøkan mátt

Kostnaðurin fyri veitingartrygdina, rullandi máttin og tøka máttin er mettur til at verða 5% av samlaða rakstrarkostnaðinum íroknað netábyrgd og umsiting av Sunds- og Vágsverkinum, svarandi til ávikavist 6,8 mió. kr. og 1,6 mió. kr. Talan er um ein part av ásettu metingini av kostnaðinum.

Kostnaðurin fyri netábyrgdina annars er grundaður á kostnaðin hjá felagnum av smáverkum kring landið, sum verða mett sum eyka verk ella tøkur máttur. Smáverkini fáa rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar endurgoldnan fyri veitingartrygd, restin av kostnaðinum verður endurgoldin sum keyp av framleiðslu til víðarisølu. Elverkið á Strond fær rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar fyri termiska framleiðslu av elmegi umfataða sum veitingartrygd. Restin av kostnaðinum verður endurgoldin sum keyp av framleiðslu til víðarisølu.

## Kostnaður fyri netábyrgd samanumtikið

Samlaður kostnaður fyri stýring av elnetinum í Føroyum er 4,6 mió. kr., meðan kostnaðurin fyri veitingartrygdina, rullandi máttin og tøka máttin á Sundsverkinum og Vágsverkinum er settur til 8,4 mió. kr. Kostnaðurin fyri veitingartrygdina v.m. frá øðrum verkum er 5,8 mió. kr., svarandi til, at samlaður kostnaður fyri veitingartrygd, tøkan rullandi eykamátt og stýring av elnetinum er mettur til 18,8 mió. kr.

## Lønarútreiðslur

Nógv virkisøkir eru í felagnum, og SEV fylgir teimum almennu sáttmálunum, sum eru galdandi á teimum ymisku økjunum. Samlaðu lønarútreiðslurnar í 2018 vóru 37,5 mió. kr. móti 33,5 mió. kr. í 2017 íroknað fyrisiting, svarandi til eina størri nýtslu upp á 4,0 mió. kr.

Lønarútreiðslurnar fyri netvirksemið vóru 23,5 mió. kr. í 2018 móti 21,0 mió. kr. í 2017 ella ein meirnýtsla upp á 2,5 mió. kr. ella 11,7% hægri, meðan lønarútreiðslurnar til fyrisitingina vóru 14,0 mió. kr. í 2018 móti 12,4 mió. kr. í 2017 svarandi til eina størri nýtslu upp á 1,6 mió. kr. ella 12,5%, tá er javningin fyri eftirlønarskylduna innroknað.

Verður sæð burtur frá javnan av eftirlønarskylduni, eru lønarútreiðslurnar í 2018 14,3 mió. kr. móti 13,8 mió. kr. í 2017, sum eru 0,5 mió. kr. hægri enn undanfarna ár.

## Tilfar og tænastuveitingar

Útreiðslurnar til tilfar og tænastuveitingar í 2018 vóru 28,0 mió. kr. móti 28,9 mió. kr. í 2017, og eru 0,9 mió. lægri í 2018 enn 2017.

## Netvirksemið

Útreiðslur til tilfar og tænastuveitingar til netvirksemið í 2018 vóru 9,9 mió. kr. móti 10,4 mió. kr. í 2017 svarandi til eina minni nýtslu upp á 0,5 mió. kr. grundað á nýtslu hjá rakstrardeildum felagsins.

## Fyrisiting

Útreiðslur til tilfar og tænastuveitingar til fyrisiting í 2018 vóru 18,1 mió. kr. móti 18,5 mió. kr. í 2017, og eru hesar sostatt 0,4 mió. kr. lægri í 2018 enn 2017.

Víst verður annars til fleiri sundurgreiningar í tølunum innan kostnaðin fyri tilfar og tænastuveitingar í samtaksroknskapinum hjá felagnum, sum sæst á www.sev.fo.

## Fíggjarkostnaður

Rentuútreiðslurnar vóru 25,3 mió. kr. í 2018 móti 23,5 mió. kr. í 2017 svarandi til ein hægri fíggjarkostnað upp á 1,8 mió. kr. Í samlaða talinum á 24,1 mió. kr. er íroknaðar kapitalinntøkur upp á 1,2 mió. kr. frá dótturfeløgum.

Í løtuni hevur felagið eina samlaða bruttoskuld uppá 1.342 mió. kr. við fastari rentu stavandi frá lánsbrøvum við fastari rentu og eini rentuumbýtingaravtalu. Nærri lýsing av fíggjarkostnaðinum er at finna í samtaksroknskapinum hjá felagnum, sum sæst á www.sev.fo.

## Avskrivingar

Avskrivingarnar fyri 2018 vóru 40,9 mió. kr. móti 34,9 mió. kr. í 2017, harav 34,6 mió. kr. stava frá netvirkseminum og 6,3 mió. kr. frá fyrisitingini.

Gjørdar verða metingar av, tá ið fíggjarætlanin verður gjørd fyri komandi ár, hvørjar íløgur væntandi verða lidnar í árinum og harvið tiknar í nýtslu, og byrjað verður at avskriva upp á ognina.

## Íløgur

Íløgur í koplingarstøðir og net eru fyri tilsamans 153,8 mió. kr. í 2018 í mun til 120,7 í 2017, sum talva 3 vísir.

Tilgongd frá arbeiði í gerð og beinleiðis bókað til støðisogn (tilgongd til støðisogn- avskrivingargrundarlagið) vóru 140,9 mió. kr. í 2018 móti 47,1 mió. kr. í 2017. Víst verður til arbeiði í gerð og til notu 7 í roknskapinum.

Stórar íløgur innan net, koplingarstøðir, bygningar og annað innan netið eru gjørdar seinastu árini og í 2018, eins og stórar íløgur standa fyri framman. Serliga er talan um, at netið er styrkt og skal framhaldandi styrkjast fyri at gera SEV ført fyri at taka ímóti meiri vindorku og veita tann streym, sum kundar felagsins hava tørv á.

Nógvar íløgur eru gjørdar seinastu árini í nýggjar koplingarstøðir og 2018 er einki undantak. Talan er um støðir, sum eru týdningarmiklar fyri at kunna føra elorku fram til einstøku økini kring landið. Samanlagt eru í íløgur í koplingarstøðir gjørdar fyri 75,6 mió. kr., meðan íløgur í net v.m. eru 63,1 mió. kr.

Av íløgunum til koplingarstøðir er íløgan í koplingarstøðina innan Eið 5,6 mió. kr., og henda bleiv tikin í nýtslu í mars mánað í 2018. Íløgan í gamla elverkið í Trongisvági, sum bleiv niðurlagt og umbygt til koplingarstøð, er 6,7 mió. kr. SEV er eisini farið undir at byggja nýggja koplingarstøð í Vestmanna. Henda koplingarstøðin kemur í staðin fyri gomlu støðina, sum nú hevur tænt fyri seg. Arbeiðið byrjaði við endan av 2018 og íløgan er 6,7 mió. kr. Støðin væntast at verða liðugt medio 2020. Koplingarstøðin norðuri á Strond er um at verða liðug og íløgan í støðina í 2018 er 24,1 mió. kr. Við hesi støðini og tá tilhoyrandi kaðalarbeiði er liðugt hevur SEV fingið nógv størri og betur møguleika at føra tann streym kundarnir spyrja eftir í hesum partinum av landinum.

| Talva 3. Íløgur í mió. kr. | Upprunaætlan 2018 fyri íløgur | Umraðfesting av íløgum 2018 | Ætlan eftir umraðfesting | Íløgur sambært roknskap 2018 | Frávik í mun til rokskap og javnað ætlan |
|---|---|---|---|---|---|
| | 1 | 2 | 3=1+2 | 4 | 5=3-4 |
| Koplingarstøðir og net v.m. | 146,4 | -1,1 | 145,3 | 138,6 | -6,6 |
| Fyrisitingarbygningur, amboð, KT-útgerð | 20,0 | 0,0 | 20,0 | 15,1 | -4,9 |
| **Tilsamans** | **166,4** | **-1,1** | **165,3** | **153,8** | **-11,5** |

| Talva 4. Íløgur tilsamans | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| Íløgur bókaðar til arbeiði í gerð | 143,5 | 107,5 |
| Beinleiðis bókaðar íløgur sum tilgongd | 10,2 | 13,2 |
| **Íløgur við ársenda** | **153,8** | **120,7** |

| Talva 5. Arbeiði í gerð | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| Salda við ársbyrjan | 155,1 | 79,4 |
| Íløgur bókaðar til arbeiði í gerð | 143,5 | 107,5 |
| Arbeiðir førd til avskrivingar sum tilgongd | -130,7 | -31,8 |
| **Salda við ársenda** | **167,9** | **155,1** |
| Broyting í arbeiði í gerð | 12,8 | 75,7 |

| Talva 6. Tilgongd til støðisogn | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| Arbeiðir førd til avskrivingar sum tilgongd | 130,7 | 31,8 |
| Beinleiðis bókaðar íløgur sum tilgongd á støðisogn | 10,2 | 15,4 |
| **Tilgongd við ársenda** | **140,9** | **47,1** |

Í sambandi við útbyggingina av Sundsverkinum, støð 3 verður nýggj koplingarstøð eisini bygd og íløgan í støðina er 28,8 mió. kr. í 2018. Støðin væntast liðug í 2019. Aðrar íløgur í koplingarstøðir eru 3,7 mió. kr.

Íløgur í fjarskiftismálarar, verkfrøði og teknikk eru 8,2 mió. kr. Íløgan í fjarskiftismálararnar v.m. er 1,1 mió. kr. og 5,2 mió. kr. í nýggja stýrisskipan av elnetinum. Aðrar íløgur eru fyri 1,9 mió. kr.

Nógv arbeiði fer eisini fram kring landið fyri at styrkja netið. Av teimum 63,1 mió. kr. sum eru íløgur í net, kunnu hesar sundurgreinast í íløgur fyri 13,4 mió. kr. í net í Norðoyggjum, 10,5 mió. kr. í Eysturoy, 3,3 mió. kr. í Vágoy, í Miðstreym 1,3 mió. kr. 11,4 mió. kr. í Suðurstreymoy, 1,2 mió. kr í Sandoy og 7,7 mió. kr. í Suðuroy. Harumframt annað fyri net 14,3 mió. kr.

Víst verður annars til nærri umrøðu um íløgurnar í samtaks-roknskapinum, sum sæst á www.sev.fo.

## Gjaldførið

Gjaldførið er ikki skilt sundur millum framleiðslu og net, og hava millumrokningar millum partarnar verið nýttar. Í roknskapinum hjá framleiðsluverkunum er gjaldførið ásett til 0 mió. kr., men alt virksemið hjá verkunum verður fíggjað av netpartinum, sum tryggjar verkunum neyðugt gjaldføri. Sama er galdandi fyri vindfeløgini, sum eisini verður fíggjað av netpartinum.

Gjaldføri felagsins við ársenda 2018 er 190,8 mió. kr. móti 248,0 mió. kr. í 2017. Harumframt koma óbrúktir trekningsrættir og kassakredittir í peningastovnum upp á tilsamans 314,9 mió. kr.

Sostatt er tøki peningurin, kredittir og óbrúktir trekningsrættir 505,7 mió. kr. í 2018 móti 768,0 mió. kr. í 2017. Størsti parturin av óbrúktu trekningsrættunum skal brúkast til at fíggja íløgur komandi árini.

Endamálið er at hava eitt munagott gjaldføri soleiðis, at SEV altíð er ført fyri kontant at rinda fyri eitt oljukeyp og kostnaðin av einum óhappi á einum av framleiðsluverkunum ella á netinum. Harumframt er neyðugt at hava eitt trygt gjaldføri til dagliga raksturin av framleiðsluverkunum og av netinum. Eisini verður mett skilagott at hava eitt munagott gjaldføri við atliti at ótryggleikanum á fíggjarmarknaðunum kring heimin. Nærri lýsing av gjaldførinum er at finna í samtaksroknskapinum, sum sæst á www.sev.fo.

## Váðaviðurskifti

Váðaviðurskifti hjá felagnum kunnu greinast í ymiskar bólkar:

Nærri lýsing av váðaviðurskiftunum er at finna í samtaks-roknskapinum, sum sæst á www.sev.fo.

## Útlit fyri rakstrarárið 2019

Úrslitið áðrenn skatt fyri 2019 er eitt ætlað yvirskot upp á umleið 34,7 mió. kr. eftir skatt við støði í fyriliggjandi ætlan fyri 2019. Hetta er eitt úrslit, sum er nøktandi, eins og úrslitið frameftir má geva eitt nøktandi avlop.

Tað er neyðugt at fremja haldgóðar loysnir fyri raksturin, herundir áseting av einum nøktandi kWt prísi. Tí hevur felagið gjørt nógv burtur úr at hyggja at prísskránni, fyri at meta um, hvørt einstøku prísirnir eru teir røttu. Upprunaliga er roknað við eini øking í elnýtsluni upp á 7,1% í miðal í 2019 í mun til staðfest 4,6% í 2018. Hendan øking stavar frá ætlaðum vøkstri í fleiri kundabólkum við ymiskum vakstrarratum. Talan er um eina øking í søluni av kWt.

Við støði í søluni fyri 2017 og partvíst í 2018 er ætlað við eini sølu í 2019 upp á 338,4 GWt ella 456,2 mió. kr. Fasta gjaldið verður stórt sæð óbroytt upp á 17,0 mió. kr. Harumframt koma inntøkur frá íbindingargjaldinum og annað upp á 12,0 mió. kr. soleiðis, at ætlað er við eini samlaðari inntøku upp á 485,3 mió. kr. í 2019 móti 429,6 mió. kr. í 2018. Hetta svarar til, at felagið fær eina meiri inntøku upp á 55,7 mió. kr. í mun til 2018.

| Marknaðarváði | Kreditt- og mótpartsváði | Rakstrarligir váðar | Strategiskir og aðrir váðar |
|---|---|---|---|
| Rentuváði | Áogn hjá kundum | Veitingartrygd | Teir strategisku váðarnir eru meira yvirskipað tengdir at, hvussu felagið skipar sítt virksemi, politisk viðurskifti, umdømi o.s.fr. |
| Oljuprísváði | Innistandandi hjá bankum | Kunningartøkni (KT) | |
| Gjaldoyraváði | Lánsbrøv | Feilir í innanhýsis mannagongdum | |
| Gjaldførisváði | Tryggingar | Feilir av mannaávum | Nýggj tøkni (disruption) |
| | | Heilsa, trygd og umhvørvi | Verkætlanir |
| | | | Vitanarstøði og menning |

SEV hevur stovnað sjálvstøðug dótturfeløg at umsita vindmyllulundirnar í ávikavist Neshaga og Húsahaga. Hetta viðførir, at keyp av vindorku er økt, samstundis sum kostnaður av tilfari og lønum, avskrivingingum og rentum er lækkaður. Úrslitið frá dótturfeløgum verður tikið inn í roknskapin gjøgnum úrslit av kapitalpørtum. Samlaða úrslitið hjá SEV ávirkast ikki.

Rakstrarútreiðslurnar verða mettar at verða 76,3 mió. kr. í 2019 móti 65,8 mió. kr. í 2018 svarandi til eina hægri útreiðslu á 10,5 mió. kr. Ætlað er við avskrivingum upp á 50,7 mió. kr. og rentuútreiðslum upp á 11,6 mió. kr. Øktu rentuútreiðslurnar seinastu árini stava frá øktari skuld til at fíggja serliga rakstur og partvíst íløgur.

Við einum mettum yvirskoti í 2019 sum er nøktandi, luttekur raksturin fyri netpartin við einari nøktandi eginfígging til íløgur. Tað er neyðugt at hava eitt nøktandi úrslit og harvið eina nøktandi eginfígging frá rakstrinum, sum skal vera við til at fíggja komandi íløgur í koplingarstøðir og viðlíkahald av verandi neti, eins og íløgur í menningini av netinum skal gerast, fyri at taka ímóti alsamt vaksandi partinum av elmegi frá varandi orkukeldum og veita hesa víðari til viðskiftafólk felagsins.

Nærri lýsing av 2019 sæst í Rakstrar-, fíggjar- og íløguætlan felagsins fyri 2019 á www.sev.fo.

### Hendingar eftir roknskaparlok

Frá degnum fyri fíggjarstøðuni til í dag er einki hent, sum ávirkar metingina av ársfrásøgnini.

# Nýttur roknskaparháttur

## ALMENT

Ársfrásøgnin fyri Elfelagið SEV er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri stór feløg í flokki C.

Netroknskapurin er gjørdur upp sum ein samtaksroknskapur uttan útjavnan av innanhýsis bókingum í rakstri og javna. Hetta fyri at geva lesaranum so góða kunning sum gjørligt um alt netvirksemi hjá SEV-samtakinum. Annars er ársfrásøgnin gjørd eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørd í donskum krónum.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanberingartøl undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

Har sum talvur í roknskapinum vísa tøl avrundaði til heilar túsund ella millión krónur, og talvan inniheldur samanburðartøl millum ár víst sum munur í krónum ella prosentum, eru samanburðartølini roknaði upp á undirliggjandi tølini og síðani avrundað. Tískil kann koma fyri, at smærri munir eru millum avrundaðu tølini, sum víst verða í talvuni, og útroknaðu samanburðartølini í talvuni.

### Alment um innrokning og virðisáseting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið av skylduni kann ásetast álítandi.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

### Umrokning av fremmandum gjaldoyra

Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyrakursmunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarpostur.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða umroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

## RAKSTRARROKNSKAPURIN

### Nettosøla

Nettosøla verður innroknað í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan roknskaparlok, og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Nettosølan verður innroknað uttan meirvirðisgjald, avgjøld og eftir at avsláttur í samband við søluna er frádrigin.

### Vørunýtsla

Vørunýtsla umfatar kostnaðir til keyp av rávørum og hjálpartilfari, frádrigið avsláttur og goymslubroyting í árinum.

### Aðrir uttanhýsis kostnaðir

Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata keyp av olju, tilfari og øðrum tænastuveitingum, umframt annan fyrisitingarkostnað.

### Rakstrarbýti, framleiðsla og net

Inntøkur hjá framleiðsluverkum eru ásettar at samsvara við samlaða kostnaðin hjá elverkunum, umframt at ein vinningur av framleiðsluni av primo egingognini er innroknaður. Roknaði vinningurin er ásettur við støði í avkasti av langfreistaðum realkredittlánsbrøvum og virðisrøkt av ognum hjá framleiðslupartinum.

Samlaði kostnaðurin hjá elverkunum stendst av kostnaðinum í sambandi við at framleiða elmegi umframt kostnaðin fyri netábyrgd. Hesin kann sundurgreinast í kostnaðin fyri stýring av elnetinum, kostnaðin fyri veitingartrygd, rullandi mátt, tøkan mátt og kostnaðin fyri netábyrgd annars.

Kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum í meginøkinum er uppgjørdur sum samlaður kostnaður fyri lønir á Fossáverkinum, frádrigið kostnaðin fyri lønir til vanligan rakstur av verkinum. Kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum í Suðuroy er tann sami sum fyri stýringina av elnetinum í meginøkinum.

Kostnaðurin fyri veitingartrygdina, rullandi máttin og tøka máttin er ein partur av samlaða rakstrarkostnaðinum, íroknað partar av avskrivingum hjá Sunds og Vágsverkinum. Talan er um eina ásetta meting av kostnaðinum.

Kostnaðurin fyri netábyrgdina annars er grundaður á kostnaðin hjá smáverkum kring landið. Smáverkini fáa rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar endurgoldnan fyri veitingartrygd. Restin sum eginframleiðsla. Elverkið á Strond fær rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar fyri termiska framleiðslu av elmegi endurrindaðan sum veitingartrygd. Restin av kostnaðinum kemur frá eginframleiðslu.

Sambært elveitingarlógini skal netvirksemið fíggjarliga hvíla í sær sjálvum soleiðis, at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda fyri rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur.

Fyri netpartin merkir hetta, at hesin skal hava eina inntøku svarandi til tær útreiðslur netparturin hevur soleiðis, at netparturin kann gjalda fyri raksturin umframt at netparturin skal hava inntøkur til at kunna rinda fyri ætlaðar neyðugar íløgur. Inntøkurnar fyri neyðugu íløgurnar taka støði í kravinum til eginfígging.

SEV hevur mett, at ein eginfígging uppá 25% er nøktandi, og hevur í roknskapinum tikið hædd fyri hesum kravinum í roknskapinum fyri framleiðslupartin og netpartin.

Kravið til støddina av eginfíggingini tekur støði í íløgunum á fíggjarætlanini fyri framleiðslupartin og netpartin fyri eitt 5 ára tíðarskeið sum er inniverandi ár og næstu 4 árini. Eginfíggingin fyri inniverandi ár verður roknað soleiðis: peningastreymurin frá rakstur minus kostnað til rentur og avdrátt sett í mun til kravið uppá 25% fyri eginfígging av árligu miðalíløgum næstu 5 árini.

Fyri netpartin merkir hetta, at ársúrslitið verður tillagað soleiðis, at yvirskotið er svarandi til tær útreiðslur netparturin hevur umframt eina eginfígging uppá 25% av árligu miðalíløgunum næstu 5 árini fyri netpartin. Um samlaða úrslitið fyri samtakið er størri enn úrslitið fyri netpartin verður hesin partur av úrslitinum fluttur til framleiðslupartin.

## Starvsfólkakostnaðir
Starvsfólkakostnaðir umfata løn íroknað frítíðarløn og eftirløn umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum verða móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

## Av- og niðurskrivingar
Av- og niðurskrivingar umfata av- og niðurskrivingar í árinum av immateriellari og materiellari støðisogn.

## Fíggjarpostar
Fíggjarligir postar umfata rentuinntøkur og -kostnaðir umframt staðfestan og óstaðfestan kursvinning og -tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

Órealiseraður rentukostnaður í samband við prístrygging.

Vinningsbýti frá kapitalpørtum í assosieraðum feløgum verður inntøkuført í tí roknskaparári, sum vinningsbýti verður samtykt.

Rentukostnaðir og aðrir kostnaðir av lánum til at fíggja framleiðslu av immateriellari og materiellari støðisogn, og sum viðvíkja framleiðslutíðarskeiðinum, verða ikki innroknaðir í útveganarvirðið av støðisognini.

## Inntøkur av kapitalpørtum í atknýttum feløgum
Í rakstrarroknskapi móðurfelagsins verður tann lutfalsligi parturin av úrslitinum eftir skatt hjá atknýtta felagnum innroknaður eftir eliminering av innanhýsis vinningi ella tapi.

## FÍGGJARSTØÐAN

## Materiell støðisogn
Materiell støðisogn verður virðisásett til útveganarvirði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskrivingar. Grundøki verða ikki avskrivað.

Avskrivingargrundarlagið umfatar útveganarvirðið við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna brúkstíð.

Útveganarvirðið umfatar keypsprísin og kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini, til ognin er klár at taka í nýtslu.

Avskrivað verður javnt yvir væntaðu brúkstíðirnar og restvirðunum hjá ognunum:

| | *Brúkstíð* | *Restvirði* |
|---|---|---|
| Býtisvirkir | 10-50 ár | 0% |
| Bygningar | 50 ár | 0% |
| Rakstrargøgn og innbúgv | 3-5 ár | 0% |

Smáamboð við eini væntaðari livitíð á undir 1 ár verða útreiðsluførd í útveganarárinum. Viðvíkjandi eginframleiddum ognum fevnir útveganarvirðið um kostnaðir av tilfari, lutum, undirveitarum, beinleiðis lønarkostnaði og óbeinleiðis framleiðslukostnaði.

## Niðurskriving av støðisogn

Hvørt ár verða roknskaparligu virðini á materiellari støðisogn mett fyri at fáa ábending um, hvørt tey eru minkað í virði. Hetta kemur afturat vanligu avskrivingini.

Eru ábendingar um virðisminking, verður ein niðurskrivingarroynd gjørd av hvørji einstakari ogn ella ognarbólki. Niðurskrivað verður til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið.

Sum endurvinningarvirði verður hægra virði av nettosøluprísi og kapitalvirði nýtt. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðum nettoinntøkum frá nýtsluni av ognini ella ognarbólkinum.

## FÍGGJARLIG STØÐISOGN

## Kapitalpartar í assosieraðum feløgum

Kapitalpartar í assosieraðum feløgum verða virðisásettir til útveganarvirði. Er nettorealisatiónsvirðið lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

## Vørugoymslur

Vørugoymslur verða virðisásettar til útveganarvirði eftir FIFO-háttinum. Um nettorealisatiónsvirðið av vørugoymslunum er lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

Útveganarvirðið á handilsvørum umframt rávørum og øðrum hjálpartilfari umfatar keypsprís umframt flutningsgjald.

Útveganarvirðið av framleiddum liðugvørum og vørum í gerð umfatar útveganarvirði av rávørum, hjálpartilfari, beinleiðis lønarkostnaðum og óbeinleiðis framleiðslukostnaðum. Óbeinleiðis framleiðslukostnaðir umfata óbeinleiðis tilfar og løn umframt viðlíkahald og avskrivingar av maskinum, virkisbygningum og útgerð, ið verður nýtt í framleiðsluni. Harumframt umfatar posturin kostnaðir til at leiða og fyrisita framleiðsluna, umframt ognarførdan menningarkostnað, ið viðvíkur vøruni.

## Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

## Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, umfata staðfestar kostnaðir, sum viðvíkja komandi roknskaparári.

## Tøkur peningur

Tøkur peningur umfatar tøkan pening og stuttfreistaði virðisbrøv, ið hava eina lánitíð undir 3 mánaðir, og sum uttan forðingar kunnu umsetast til tøkan pening, og har tað bara er ótýðandi váði fyri virðisbroytingum.

## Partafelagsskattur og útsettur skattur

Skyldugur skattur og skattaáogn verða innroknað í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt frá undanfarnum árum. Skyldugur skattur og skattaáogn verða víst mótroknað í tann mun, at hetta er í samsvari við lógina, og at postarnir væntandi verða avroknaðir netto ella samstundis.

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum. Hetta verður uppgjørt við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini, ella hvussu skyldan ætlandi verður afturgoldin.

Útsett skattaáogn, herímillum skattliga virðið á framflytingarheimilaðum skattligum hallum, verður innroknað við tí virði, sum ognin væntandi verður realiserað fyri, antin við at javna í skatti av framtíðarinntøkum ella við at mótrokna útsetta skattaskyldu innan fyri somu løgfrøðiligu skattaeind. Møgulig útsett nettoskattaáogn verður tikin við til nettorealisatiónsvirðið.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi við roknskaparlok.

Broytingar í útsetta skattinum, sum standast av broytingum í skattasatsum, verða innroknaðar í rakstrarroknskapin.

## Aðrar avsettar skyldur

Avsettar skyldur umfata væntaðar kostnaðir av ábyrgdarskyldum, tap upp á arbeiði í gerð, umskipanir v.m. Avsettar skyldur verða innroknaðar, tá felagið hevur eina rættarliga ella ítøkiliga skyldu orsakað av einari hending, sum hevur verið, og tað er sannlíkt, at skyldan verður avgreidd við at brúkt verður av fíggjarligu ognunum hjá felagnum.

Avsettar skyldur verða virðisásettar til nettorealisatiónsvirði ella til dagsvirði, tá tað er væntandi, at skyldan skal avgreiðast í fjarari framtíð.

## Avleidd fíggjarlig amboð

Felagið nýtir avleidd fíggjarlig amboð til at tryggja gjaldoyraváða, oljuprísváða og rentuváða.

Avleidd fíggjarlig amboð verða upprunaliga innroknað til dagsprís, og beinleiðis transaktiónskostnaðir verða innroknaðir í raksturin. Aftaná upprunaligu innrokningina verða avleidd fíggjarlig amboð innroknað til dagsprís, og broytingar í virðinum verða innroknaðar sum greitt frá í tí fylgjandi. Felagið hevur ikki handilslig avleidd fíggjarlig amboð.

Handilslig avleidd fíggjarlig amboð verða roknað sum stuttfreistað aktiv ella passiv. Dagsvirði av einari trygging verður roknað sum langfreistað aktiv ella passiv, um tryggingartíðarskeiðið er longri enn 12 mánaðir og, sum stuttfreistað aktiv ella passiv, um tryggingartíðarskeiðið er styttri enn 12 mánaðir.

## Gjaldføristrygging

Broytingar í dagsprísi á avleiddum tryggingaramboði nýtt til gjaldføristrygging verða innroknaðar beinleiðis í eginognina í tann mun, tryggingin er effektiv. Í tann mun at tryggingin er óeffektiv, verða broytingar í dagsprísi innroknaðar í vinning ella tap.

Um tryggingaramboðið ikki longur lýkur treytirnar fyri innrokning av trygging, gongur út ella verður selt, verður uppsagt ella nýtt, heldur innrokningin uppat. Akkumuleraður vinningur ella tap innroknað í eginognina verður verandi har, inntil ætlaða transaktiónin fer fram. Tá tryggjaða upphæddin viðvíkur eini ikki-fíggjarligari ogn, verður upphæddin innroknað í eginognina flutt til bókaða virðið á ognini. Í øðrum førum verður upphæddin innroknað í eginognina flutt til vinning ella tap í tí tíðarskeiði, sum tryggjaða ognin hevur við sær vinning ella tap.

## Skuld

Í sambandi við lántøku verður fíggjarlig skuld innroknað til útveganarvirðið, svarandi til móttiknu upphæddina eftir frádrignan handilskostnað. Eftirfylgjandi tíðarskeið verður fíggjarlig skuld innroknað til amortiserað útveganarvirðið, sum svarar til kapitaliseraða virðið við effektivu rentuni, soleiðis at munurin millum móttiknu upphæddina og áljóðandi virðið, verður innroknaður í rakstrarroknskapin yvir lánitíðarskeiðið.

Skuld til realkredittstovnar og peningastovnar verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum svarar til restskuldina, tá talan er um kontantlán. Viðvíkjandi lánsbrævalánum verður amortiserað útveganarvirði roknað sum kontantvirði á lánsupptøkudegnum, javnað við gjørdum avskrivingum í avdráttartíðarskeiðnum av kursjavningini av láninum á upptøkudegnum.

Onnur skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

## Peningastreymsuppgerð

Peningastreymsuppgerðin verður uppsett eftir óbeinleiðis háttinum og vísir peningastreymar frá rakstri, íløgum, fígging, broyting í peningastreymum og tøkan pening við ársbyrjan og enda.

Peningastreymar frá rakstri eru tillagaðir fyri ikki likvidar rakstrarpostar, broyting í rakstrarkapitali og goldnan skatt.

Peningastreymar frá íløgum umfata keyp og sølu av immateriellari, materiellari og fíggjarligari støðisogn mótroknað broytingum í áogn og skuld viðvíkjandi nevndu postunum.

Peningastreymar frá fígging umfata fígging frá eigara, goldnum vinningsbýti til eigara og upptøku av láni og avdráttir av langfreistaðari skuld, umframt trekk upp á kassakredittir.

Tøkur peningur við ársbyrjan og enda er kassapeningur og innistandandi í peningastovnum.

## Lyklatøl

Lyklatøl eru útroknað í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforenings "Anbefalinger & Nøgletal 2010".

Høvuðs- og lyklatølini í yvirlitinum eru roknað soleiðis:

$$\text{Renting av eginogn} = \frac{\text{Úrslit}}{\text{Miðal eginogn} \times 100}$$

$$\text{Ognarumferð} = \frac{\text{Nettoumsetningur}}{\text{Aktiv tilsamans}}$$

$$\text{Eginognarpartur} = \frac{\text{Eginogn ultimo} \times 100}{\text{Aktiv tilsamans}}$$

# Rakstrarroknskapur 1. januar – 31. desember

| | Nota | 2018<br>DKK | *2017*<br>*t. DKK* |
|---|---|---|---|
| **Nettoumsetningur** | 1 | **429.647.947** | ***434.900*** |
| Keyp av streymi | | -239.722.725 | *-262.078* |
| Keyp av vindorku | | -2.692.050 | *-2.844* |
| Netábyrgd og netumsiting | | -18.836.387 | *-16.803* |
| Oljuútreiðslur | 2 | -249.595 | *-233* |
| Tilfar og tænastuveitingar | 3 | -28.035.054 | *-28.856* |
| **Bruttovinningur** | | **140.112.137** | ***124.086*** |
| Starvsfólkaútreiðslur | 4 | -37.501.387 | *-33.484* |
| **Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar** | | **102.610.749** | ***90.602*** |
| Av- og niðurskriving av materiellari støðisogn | | -40.915.163 | *-34.919* |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | | **61.695.586** | ***55.684*** |
| Fíggjarútreiðslur | 5 | -24.102.155 | *-21.348* |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **37.593.432** | ***34.335*** |
| Skattur av ársúrsliti | 6 | -8.968.199 | *-1.033* |
| **Ársúrslit** | | **28.625.233** | ***33.302*** |
| **Uppskot til býti av úrsliti:** | | | |
| Flutt úrslit | | 27.433.125 | *31.190* |
| Tiltaksgrunnur fyri nettouppskriving eftir innanvirðisháttinum | | 1.192.108 | *2.112* |
| **Til nýtslu** | | **28.625.233** | ***33.302*** |

# Fíggjarstøða 31. desember

| OGN | Nota | 31.12.18 DKK | *31.12.17 t. DKK* |
|---|---|---|---|
| Býtisvirkir | 7, 18 | 613.372.525 | *506.444* |
| Bygningar og jarðarøkir | 7 | 33.012.554 | *34.196* |
| Rakstrargøgn | 7 | 40.576.049 | *42.309* |
| Íløguarbeiði í gerð | 7 | 167.922.384 | *155.089* |
| **Materiell støðisogn tilsamans** | | **854.883.512** | ***738.040*** |
| | | | |
| Kapitalpartar í assosieraðum virkjum | 8 | 36.117.267 | *34.925* |
| Lán veitt dóttirfeløgum | 9 | 86.859.076 | *95.107* |
| Avleidd fíggjarlig amboð | 10 | 3.043.212 | *20.532* |
| **Fíggjarlig støðisogn tilsamans** | | **126.019.554** | ***150.564*** |
| **Støðisogn tilsamans** | | **980.903.066** | ***888.604*** |
| | | | |
| Tilfar | | 19.809.583 | *18.956* |
| **Vørugoymslur tilsamans** | | **19.809.583** | ***18.956*** |
| | | | |
| Vøru- og tænastuáogn | 11 | 87.247.507 | *75.888* |
| Millumrokning framleiðsla | | 315.551.517 | *102.463* |
| Tíðaravmarkingar | | 7.084.460 | *3.282* |
| **Áogn tilsamans** | | **409.883.483** | ***181.632*** |
| **Tøkur peningur** | | **190.785.456** | ***247.993*** |
| **Ogn í umferð tilsamans** | | **620.478.522** | ***448.581*** |
| **OGN tilsamans** | | **1.601.381.588** | ***1.337.184*** |

# Fíggjarstøða 31. desember

| SKYLDUR | Nota | 31.12.18 DKK | *31.12.17 t. DKK* |
|---|---|---|---|
| Innskot | 12 | 4.139.875 | *4.140* |
| Grunnur til avleidd fíggjarambоð | 12 | -53.839.512 | *-28.251* |
| Grunnur til uppskriving eftir innaravirðisħátti | 12 | 4.367.267 | *3.175* |
| Flutt úrslit | 12 | 496.655.538 | *470.392* |
| **EGINOGN TILSAMANS** | | **451.323.167** | ***449.456*** |
| | | | |
| Avsetingar til eftirløn og líknandi skyldur | | 16.800.646 | *17.089* |
| Avsett til útsettan skatt | | 23.981.316 | *11.407* |
| **Avsetingar tilsamans** | | **40.781.962** | ***28.496*** |
| | | | |
| Langfreistað skuld | 13 | 982.641.000 | *773.377* |
| **Langfreistað skuld tilsamans** | | **982.641.000** | ***773.377*** |
| | | | |
| Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 13 | 869.797 | *870* |
| Skuld til peningastovnar | | 6.064 | *0* |
| Móttikin frammanundangjøld frá kundum | | 1.165.948 | *0* |
| Vøru- og tænastuskuld | | 55.125.961 | *22.240* |
| Avleidd fíggjarlig amboð | 10 | 59.284.937 | *56.739* |
| Onnur skuld | | 10.182.751 | *6.005* |
| **Stuttfreistað skuld tilsamans** | | **126.635.459** | ***85.855*** |
| | | | |
| **SKULD TILSAMANS** | | **1.109.276.459** | ***859.232*** |
| **SKYLDUR TILSAMANS** | | **1.601.381.588** | ***1.337.184*** |

| | |
|---|---|
| Netúrslit á økir | 14 |
| Netyvirlit | 15 |
| Veðsetingar og aðrar skyldur | 16 |

# Peningastreymsuppgerð

| | Nota | 2018<br>DKK | *2017*<br>*t. DKK* |
|---|---|---|---|
| **Ársúrslit** | | **28.625.233** | ***33.302*** |
| Reguleringar | 17 | 73.985.517 | *41.415* |
| Broyting í rakstrarpeningi: | | | |
| Vørugoymslur | | -853.959 | *1.351* |
| Áogn | | 5.545.419 | *47.596* |
| Vøru- og tænastuskuld | | 32.885.536 | *-12.478* |
| Millumrokning framleiðsla | | -216.815.730 | *-145.452* |
| Onnur rakstrarskuld | | 16.926.993 | *10.429* |
| Avleidd fíggjarlig amboð | | -26.758.011 | *-33.580* |
| **Peningastreymar frá rakstri áðrenn fíggjarligar postar** | | **-86.459.003** | ***-57.417*** |
| Rentuútreiðslur | | -25.294.262 | *-23.460* |
| **Peningastreymar frá rakstrinum** | | **-111.753.265** | ***-80.877*** |
| Keyp av materiellari støðisogn | | -140.925.172 | *-44.976* |
| Broyting arbeiði í gerð | | -12.832.903 | *-75.727* |
| **Peningastreymar frá íløgum** | | **-153.758.076** | ***-120.703*** |
| Lántøka, netto | | 200.000.000 | *106.000* |
| Tíðaravmarking av lánirentu | | 0 | *-53* |
| Avdráttir upp á langfreistaða skuld | | 8.247.736 | *8.068* |
| Øking í trekk upp á kassakreditt | | 56.529 | *59* |
| **Peningastreymar frá fígging** | | **208.304.265** | ***114.074*** |
| **Samlaðir peningastreymar í árinum** | | **-57.207.076** | ***-87.506*** |
| Tøkur peningur við ársbyrjan | | **247.992.531** | ***335.498*** |
| **Tøkur peningur við árslok** | | **190.785.456** | ***247.993*** |

# Notur

| 1. NETTOUMSETNINGUR | 2018 DKK | *2017 t. DKK* |
|---|---|---|
| kWt gjald o.a. | 402.198.899 | *393.086* |
| Fast gjald | 17.020.639 | *16.806* |
| Íbinding | 9.218.830 | *27.426* |
| Ómaksgjøld og áminning og onnur søla | 1.209.578 | *-2.418* |
| **Tilsamans** | **429.647.947** | ***434.900*** |

| 2. OLJUÚTREIÐSLUR | | |
|---|---|---|
| Gassolja | 249.595 | *233* |
| **Tilsamans** | **249.595** | ***233*** |

| 3. TILFAR OG TÆNASTUVEITINGAR | | |
|---|---|---|
| Linjur | 3.055.041 | *2.578* |
| Tangar og umhvørvi | 51.740 | *2* |
| Maskinur | 6.504 | *0* |
| El og teknikk | 157.524 | *69* |
| Bygningar og lendi | 1.526.959 | *1.210* |
| Aðalfundur og nevnd | 383.056 | *233* |
| Kanning og ráðgeving | 3.446.647 | *6.001* |
| Kunningartøkni | 4.763.018 | *4.191* |
| Leiðsla og skrivstovuhald | 2.422.035 | *1.860* |
| Tap upp á skuldarar | 538.068 | *231* |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 261.159 | *267* |
| Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 11.423.303 | *12.214* |
| **Tilsamans** | **28.035.054** | ***28.856*** |

| 4. STARVSFÓLKAÚTREIÐSLUR | 2018 DKK | *2017 t. DKK* |
|---|---|---|
| Lønir | 30.986.187 | *27.384* |
| Pensjónir | 4.710.711 | *4.501* |
| Almenn gjøld | 1.804.490 | *1.600* |
| **Tilsamans** | **37.501.387** | ***33.484*** |

| | | |
|---|---|---|
| Starvsfólk við høvuðsinntøku frá SEV | 88 | *86* |
| Ársverk | 106 | *103* |

## 5. FÍGGJARÚTREIÐSLUR

| | 2018 DKK | *2017 t. DKK* |
|---|---|---|
| Úrslit dóttirfeløg | -1.192.108 | *-2.112* |
| Regulering fíggjarlig støðisogn | -49.335 | *0* |
| Rentur, lán og bankaskuld | 21.267.325 | *15.381* |
| Stovningarkostnaðir, provisiónir | 2.294.240 | *3.538* |
| Órealiseraður kursvinningur ella -tap | 8.868.924 | *-12.703* |
| Órealiserað javning á avleidd amboð | -7.352.431 | *17.092* |
| Annar rentukostnaður | 265.539 | *152* |
| **Tilsamans** | **24.102.155** | ***21.348*** |

## 6. SKATTUR AV ÁRSÚRSLITI

| | | |
|---|---|---|
| Avsett til útsettan skatt | 8.968.199 | *1.033* |
| **Tilsamans** | 8.968.199 | ***1.033*** |

## 7. MATERIELL STØÐISOGN

| Upphædd í DKK | Býtisvirki | Bygningar | Rakstrargøgn | Tilsamans | *2017* |
|---|---|---|---|---|---|
| Útveganarvirði primo | 1.000.931.508 | 67.470.158 | 191.279.884 | 1.259.681.550 | *1.214.705.334* |
| Tilgongd í árinum | 131.434.227 | 42.379 | 10.609.282 | 142.085.887 | *47.125.491* |
| Tilgongd frá framleiðslu | 5.996.566 | 0 | 0 | 5.996.566 | *0* |
| Frágongd í árinum | 0 | 0 | -1.160.715 | -1.160.715 | *-2.149.275* |
| **Útveganarvirði ultimo** | **1.138.362.300** | **67.512.537** | **200.728.451** | **1.406.603.288** | ***1.259.681.550*** |
| Av- og niðurskriving primo | -494.487.049 | -33.273.827 | -148.970.631 | -676.731.507 | *-641.812.884* |
| Avskrivingar í árinum | -28.507.236 | -1.226.156 | -12.342.486 | -42.075.878 | *-37.067.898* |
| Tilførdar avskrivingar framleiðslu | -1.995.490 | 0 | 0 | -1.995.490 | *0* |
| Afturførdar avskrivingar, frágongd | 0 | 0 | 1.160.715 | 1.160.715 | *2.149.275* |
| Av- og niðurskriving ultimo | -524.989.775 | -34.499.983 | -160.152.402 | -719.642.160 | *-676.731.507* |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **613.372.525** | **33.012.554** | **40.576.049** | **686.961.128** | ***582.950.043*** |
| *Roknskaparligt virði ultimo 2017* | *506.444.458* | *34.196.331* | *42.309.253* | *582.950.043* | |
| Arbeiði í gerð primo | 142.856.823 | 10.467.781 | 1.764.877 | 155.089.481 | *79.362.790* |
| Tilgongd til arbeiði í gerð í árinum | 131.747.115 | 9.937.815 | 1.830.921 | 143.515.850 | *107.478.769* |
| Liðug arbeiði førd til avskrivingar | -130.392.864 | 0 | -290.083 | -130.682.947 | *-31.752.077* |
| **Arbeiði í gerð ultimo** | **144.211.074** | **20.405.596** | **3.305.714** | **167.922.384** | ***155.089.481*** |
| *Arbeiði í gerð ultimo 2017* | *142.856.823* | *10.467.781* | *1.764.877* | *155.089.481* | |
| **Støðisogn ultimo** | **757.583.599** | **53.418.150** | **43.881.763** | **854.883.512** | ***738.039.524*** |
| *Støðisogn ultimo 2017* | *649.301.281* | *44.664.113* | *44.074.130* | *738.039.524* | |

| 8. KAPITALPARTAR Í ASSOSIERAÐUM VIRKJUM | 31.12.18 DKK | *31.12.17 t. DKK* |
|---|---|---|
| Útveganarvirði primo | 31.750.000 | *31.750* |
| **Útveganarvirði ultimo** | **31.750.000** | ***31.750*** |
| Javningar primo | 3.175.159 | *1.063* |
| Úrslit dóttirfeløg í árinum | 1.192.108 | *2.112* |
| Javningar ultimo | 4.367.267 | *3.175* |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **36.117.267** | ***34.925*** |

Assosierað og atknýtt virki

| Navn og heimstaður | Ognarpartur | Eginogn | Ársúrslit | Innroknað virði |
|---|---|---|---|---|
| P/F Fjarhitafelagið, Tórshavn | 50% | 61.187.011 | 418.775 | 2.750.000 |
| P/F Vindfelagið í Húsahaga | 100% | 21.331.415 | -636.480 | 21.331.415 |
| P/F Vindfelagið í Neshaga | 100% | 12.035.852 | 1.828.587 | 12.035.852 |

Eingin roknskapur hjá P/F Fjarhitafelagnum fyriliggur fyri 2018 - upplýstu tølini eru fyri 2017

| 9. LÁN VEITT DÓTTIRFELØGUM | Áramál | Høvuðsstólur | Salda 31.12.18 | Avdráttur komandi ár | Salda um 5 ár |
|---|---|---|---|---|---|
| P/F Vindfelagið í Húsahaga | 12 ár | 75.000.000 | 63.834.201 | 5.769.944 | 39.972.511 |
| P/F Vindfelagið í Neshaga | 10 ár | 28.175.000 | 23.024.875 | 2.661.335 | 12.018.883 |
| **Tilsamans** | | **103.175.000** | **86.859.076** | **8.431.280** | **51.991.394** |

| 10. AVLEIDD FÍGGJARLIG AMBOÐ | Ogn 31.12.18 | Skuld 31.12.18 | Samlað 31.12.18 | *31.12.17 t. DKK* |
|---|---|---|---|---|
| Prístrygging olja | 0 | -14.583.091 | -14.583.091 | *20.532* |
| Prístrygging gjaldoyra | 3.043.212 | 0 | 3.043.212 | *-27.115* |
| Rentutrygging | 0 | -44.701.846 | -44.701.846 | *-29.624* |
| **Tilsamans** | **3.043.212** | **-59.284.937** | **-56.241.726** | ***-36.207*** |

Avleidd fíggjarlig amboð eru nýtt at tryggja rentugjaldingar og gjaldoyrakurs á lánum, umframt prísstøði og gjaldoyrakurs á oljukeypi. Virðini í notuni omanfyri koma fram sum munurin millum amboðini á statusdegnum í mun til tað roknaða framtíðarvirði.

| 11. VØRU- OG TÆNASTUÁOGN | 31.12.18 DKK | *31.12.17 t. DKK* |
|---|---|---|
| Elskuldarar | 89.104.917 | *78.373* |
| Aðrir skuldarar | 1.420.766 | *724* |
| Niðurskrivað upp á áogn | -2.981.882 | *-3.209* |
| **Tilsamans** | **87.543.801** | ***75.888*** |

## 12. EGINOGN

| Upphædd í DKK | Innskot | Grunnur til avleidd fíggjaramboð | Tiltaksgrunnur til uppskriving innaravirðisháttur | Flutt úrslit | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|
| Eginognaruppgerð 01.01.17 - 31.12.17 | | | | | |
| Salda pr. 01.01.17 | 4.139.875 | 5.328.933 | 1.063.385 | 439.201.836 | 449.734.029 |
| Broyting í javning avleidd fíggjarlig amboð | 0 | -33.580.200 | 0 | 0 | -33.580.200 |
| Úrslit í dóttirfeløgum | 0 | 0 | 2.111.773 | -2.111.773 | 0 |
| Ársúrslit | 0 | 0 | 0 | 33.302.118 | 33.302.118 |
| Salda pr. 31.12.17 | 4.139.875 | -28.251.267 | 3.175.159 | 470.392.179 | 449.455.946 |
| | | | | | |
| Eginognaruppgerð 01.01.18 - 31.12.18 | | | | | |
| Salda pr. 01.01.18 | 4.139.875 | -28.251.267 | 3.175.159 | 470.392.179 | 449.455.946 |
| Broyting í javning avleidd fíggjarlig amboð | 0 | -25.588.245 | 0 | -1.169.766 | -26.758.011 |
| Úrslit í dóttirfeløgum | 0 | 0 | 1.192.108 | -1.192.108 | 0 |
| Ársúrslit | 0 | 0 | 0 | 28.625.233 | 28.625.233 |
| Salda pr. 31.12.18 | 4.139.875 | -53.839.512 | 4.367.267 | 496.655.538 | 451.323.167 |

## 13. SKULD

| | Avdráttur fyrsta árið DKK | Restskuld eftir 5 ár DKK | Skuld tilsamans 31.12.18 DKK | *Skuld tilsamans 31.12.17 t. DKK* |
|---|---|---|---|---|
| Skuld til fíggjarstovnar | 0 | 983.510.797 | 983.510.797 | *773.377* |
| **Tilsamans** | **0** | **983.510.797** | **983.510.797** | ***773.377*** |

Eingin avdráttur er fyrsta árið, og verandi lániavtala fellur til gjaldingar innan í miðal 7,3 ár.

## 14. NETÚRSLIT Á ØKIR

| | Inntøkur | Olja | Tilfar | Lønir | Avskriving | Rentur | Skattur | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Koplingarstøðir | 0 | -1.456 | -810.974 | -171.980 | -8.168.878 | -11.434 | 0 | -9.164.722 |
| Býtisvirkir | -1.262.035 | -236.101 | -5.882.266 | -13.002.537 | -22.147.775 | 0 | 0 | -42.530.713 |
| Innlegging | 10.147.757 | 0 | -2.129.366 | -4.880.643 | -2.933.700 | -82 | 0 | 203.967 |
| Verkfrøði | 0 | 0 | -550.788 | -3.379.207 | -946.292 | 0 | 0 | -4.876.287 |
| Tøkni | 105.042 | 0 | -553.417 | -2.065.181 | -422.517 | 0 | 0 | -2.936.073 |
| **Net uttan fyrisiting** | **8.990.764** | **-237.557** | **-9.926.810** | **-23.499.547** | **-34.619.162** | **-11.516** | **0** | **-59.303.829** |
| Fyrisiting | 159.406.021 | -12.038 | -18.108.244 | -14.001.840 | -6.296.001 | -24.090.639 | -8.968.199 | 87.929.061 |
| **Net úrslit** | **168.396.785** | **-249.595** | **-28.035.054** | **-37.501.387** | **-40.915.163** | **-24.102.155** | **-8.968.199** | **28.625.233** |

## 15. NETYVIRLIT

| | Fugloy | Svínoy | Viðoy | Borðoy | Kunoy | Kalsoy | Eysturoy | Streymoy | Vágoy | Mykines | Nólsoy | Koltur | Hestoy | Sandoy | Skúvoy | Stóra Dímun | Suðuroy | Tilsamans | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| TRAFOSTØÐIR | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 6kV Transformarastøðir | 1 | | | 1 | | | | | | | | | | | | | | 2 | stk. |
| 10kV Transformarastøðir | | 1 | 9 | 41 | 4 | 8 | | 88 | | | 1 | | | 17 | | | 60 | 229 | stk. |
| 20kV Transformarastøðir | | | | 3 | | | 135 | 97 | 35 | | | | 1 | | | | | 271 | stk. |
| 60kV Transformarastøðir | | | | 2 | | | 4 | 5 | | | | | | | | | | 11 | stk. |
| **Samtal økir** | **1** | **1** | **9** | **47** | **4** | **8** | **139** | **190** | **35** | **0** | **1** | **0** | **1** | **17** | **0** | **0** | **60** | **513** | **stk.** |
| TRANSFORMARAR | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 6kV Transformarar | 2 | | | 2 | | | | | | | | | | | | | | 4 | stk. |
| 10kV Transformarar | | 1 | 13 | 57 | 4 | 8 | | 103 | | | 1 | | | 18 | | | 84 | 289 | stk. |
| 20kV Transformarar | | | | 4 | | | 179 | 126 | 52 | | | | 1 | 3 | | | 4 | 369 | stk. |
| 60kV Transformarar | | | | 4 | | | 7 | 14 | | | | | | | | | | 25 | stk. |
| **Samtal økir** | **2** | **1** | **13** | **67** | **4** | **8** | **186** | **243** | **52** | **0** | **1** | **0** | **1** | **21** | **0** | **0** | **88** | **687** | **stk.** |
| KAÐALSKÁP | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 0,4kV kaðalskáp | 15 | 25 | 85 | 521 | 31 | 34 | 1.620 | 2.416 | 544 | 7 | 38 | 0 | 10 | 225 | 11 | 1 | 894 | 6.477 | stk. |
| LINJUR OG KAÐALAR | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 60kV linja | | | | 1,05 | | | 37,84 | 43,2 | | | | | | | | | | 82,09 | km |
| 60kV kaðal | | | | 4,64 | | | 26,32 | 30,32 | | | | | | | | | | 61,28 | km |
| 20kV linja | | | | | | | 32,04 | 46,87 | 3,54 | | | | | | | | 9,58 | 92,03 | km |
| 20kV kaðal | | | | 11,57 | | | 238,68 | 166,65 | 57,35 | | | | 0,56 | 0,64 | | | 9,44 | 484,89 | km |
| 10kV linja | | 3,08 | 9,99 | 11,02 | 5,4 | 0,32 | | 1,1 | | | | | | 3,26 | | | 21,84 | 56,01 | km |
| 10kV kaðal | | 0,55 | 21,47 | 45,53 | 6,43 | 17,84 | | 100,23 | | | 1,47 | | | 40,51 | | | 84,11 | 318,14 | km |
| 6kV linja | 2,19 | | | 6,24 | | | | | | | | | | | | | | 8,43 | km |
| 6kV kaðal | 0,18 | | | 0,04 | | | | | | | | | | | | | | 0,22 | km |
| 0,4kV linja | | | | | | | | | | | | | | | | | | 0,00 | km |
| 0,4kV kaðal | 1,10 | 4,22 | 11,72 | 63,65 | 3,44 | 3,76 | 210,69 | 308,34 | 67,21 | 0,55 | 3,38 | 0,38 | 0,9 | 29,57 | 0,88 | 0,14 | 106,95 | 816,88 | km |
| MÁLARAR | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Fjaravlisnir kWt málarar | 63 | 80 | 281 | 2.584 | 88 | 129 | 5.551 | 11.123 | 1.647 | 55 | 179 | 4 | 42 | 830 | 54 | 5 | 2.932 | 25.647 | stk. |
| Ikki fjaravlisnir kWt málarar | 0 | 0 | 0 | 9 | 0 | 0 | 5 | 23 | 2 | 0 | 1 | 0 | 0 | 2 | 0 | 0 | 6 | 48 | stk. |
| **kWt málarar tils. /øki** | **63** | **80** | **281** | **2.593** | **88** | **129** | **5.556** | **11.146** | **1.649** | **55** | **180** | **4** | **42** | **832** | **54** | **5** | **2.938** | **25.695** | **stk.** |
| Vøkstur 2018 | 1 | 1 | -1 | 40 | 1 | 2 | 41 | 158 | 6 | 0 | 0 | 0 | 0 | 6 | 0 | 0 | 12 | 267 | stk. |

### 16. VEÐSETINGAR OG AÐRAR SKYLDUR

Víst verður til ársfrásøgnina hjá elfelagnum SEV, har veðsetingar og aðrar møguligar skyldur framganga.

| | 2018 | *2017* |
|---|---|---|
| **17. REGULERINGAR** | **DKK** | ***t. DKK*** |
| Úrslit dóttirfeløg | -1.192.108 | *-2.112* |
| Rentukostnaðir | 23.777.769 | *19.071* |
| Órealiseraðir rentukostnaðir og javning av fíggjarligum amboðum | 1.516.493 | *4.389* |
| Avskrivingar | 40.915.163 | *34.919* |
| Kursregulering lán í USD, broyting frá primo til ultimo | 0 | *-15.885* |
| Skattur | 8.968.199 | *1.033* |
| **Tilsamans** | **73.985.517** | ***41.415*** |

| **18. ÚTGREINING STØÐISOGN BÝTISVIRKIR** | | |
|---|---|---|
| Koplingarstøðir | 237.865.148 | *141.490* |
| Býtisvirkir | 375.507.377 | *364.955* |
| **Tilsamans** | **613.372.525** | ***506.444*** |

# Elkervið


Motororkuverk
Vatnorkuverk
60 kV Koplingarstøð
20 kV Koplingarstøð
Vindorka
60 kV
20 kV
10 kV
6 kV
Sjókaðal



Elfelagið SEV · Boks 319 · FO-110 Tórshavn · Tlf. 34 68 00 · sev@sev.fo · www.sev.fo